## UTTAN ÚR HEIMI

## Ósamdir reiðarar

Ósemja hevur tikið seg upp í Norges Fiskarlag, og vandi er fyri, at ein partur av reiðarunum fara at taka seg úr felagnum.

Orsøkin er ósemja um tað árliga kvotubýtið. Í øðrum partinum eru reiðararnir á teimum stóru skipunum. Hesir eru umleið 300 í tali og mynda felagið Fiskebåtredernes Forbund, sum er limur í Norges Fiskarlag. Hesi skipini fiska umleið 65 prosent av tí, sum norðmenn fiska, men kortini eru reiðararnir í minniluta í høvuðsfelagnum. Í hinum partinum eru teir, sum eiga tey smáu fiskiførini. Tey fiska tann minna partin, men hesir reiðararnir hava kortini greiðan meiriluta í høvuðsfelagnum.

Ósemjan kann sambært Bergens Tidende enda við, at reiðararnir á teimum stóru skipunum fara burtur úr Norges Fiskarlag og upp í Næringslivets Hovedorganisasjon ístaðin fyri. Nevndin í felagnum umrøddi viðurskiftini í gjár,og roknað verður við, at endalig støða verður tikin á landsfundinum, sum verður í januar.

## Ósamdir ráðharrar

Tað eydnaðist heldur ikki hesaferð fiskimálaráðharrunum í ES-londunum at semjast um eina felags støðu á fiskivinnuøkinum.

Fiskifrøðingarnir hava mælt ráðharrunum til at banna allari toskaveiði, tí stovnarnir eru so illa fyri, og ES-nevndin hevur gjørt eitt uppskot, sum skal hava til endamáls at byggja stovnarnar uppaftur. Men fleiri lond, teirra millum Danmark, eru ímóti at steðga toskafiskiskapinum. Danski fiskimálaráðharrin, Mariann Fischer Boel, sigur við Ritzau, at eitt veiðibann fer at raka Danmark órímiliga meint, men hon ásannar, at tað verður trupult hjá dønum at halda fast við sína støðu. Danmark fær stuðul frá Bretlandi, Niðurlondum og Írlandi, meðan serliga Týskland og Svøríki taka undir við víðgongdum tiltøkum.

Danska fiskivinnan er hart ímóti ætlanini hjá ES-nevndini. Í vinnuni verður sagt, at verður toskafiskiskapurin steðgaður, fer tað at gera enda á donsku fiskivinnuni. Roknað verður við, at eitt toskabann fer at bera í sær, at tveir triðingar av teimum donsku fiskimonnunum noyðast at finna sær okkurt annað at gera.

## Ætla at selja av landinum

Herfyri varð stjórin í stóra russiska oljufelagnum Yukos, Mikhail Khodorkovskij, tikin og settur fastur, tí myndugleikarnir leggja hann undir at hava snýtt tað almenna fyri fleiri milliardir krónur.

Handtøkan fekk stóra ávirkan á partabrævavirðið í felagnum, sum fall nógv ta fyrstu tíðina eftir handtøkuna. Tað hevur havt við sær, at ein av teimum størstu eigarunum í Yukos, Leonid Nezlin, nú roynir at selja ein part av sínum partabrøvum av landinum. Hann vil ikki siga, um áhugi er, men váttar fyri Reuters, at samráðingar eru við einstakar útlendskar íleggjarar.

Leonid Nezlin man ikki kenna seg serliga tryggan, eftir at Mikhail Khodorkovskij er tikin. Í hvussu fór hann til Ísraels fyrr í hesum mánaðinum, og har hevur hann nú fingið ríkisborgararætt.

## Tað var morð

Løgreglan í Humberside í Onglandi hevur tikið ein 24 ára gamlan mann, sum er undir illgruna fyri morð.

Tann 4. juni doyði tann 20 ára gamli Stephen Hilder, tá hann leyp út í fallskíggja. í 4.000 metra hædd í North Lincolnshire Í fyrstani varð hildið, at talan var um eina vanlukku, men kanningar av fallskíggjanum avdúkaðu, at onkur hevði pilkað við hann, soleiðis at hann virkaði ikki.

Stephen Hilder gekk á einum hernaðarskúla í Shrivenham í Oxfordshire,og løgreglan hevur avhoyrt fleiri av næmingunum. Úrslitið varð, at tann 24 ára gamli varð tikin tann 22. oktober, men hann varð seinni latin leysur ímóti veðgjaldi. Mánadagin varð hann tikin aftur, tí løgreglan hevur illgruna um, at tað var hann, sum hevði pilkað við fallskíggjan hjá Stephen Hilder.

# Bush ikki væl sæddur í London



*Seinastu dagarnar hava fólk fyrireikað seg til at mótmæla vitjanini hjá Bush í London, og roknað verður við stórum mótmælisgongum í morgin*

**Í gjárkvøldið kom George W. Bush til London, hvørs borgarstjóri kallar amerikanska forsetan ta størstu hóttanina ímóti lívinum á Jørðini. Avvarðandi hjá bretskum hermonnum, sum eru falnir í Irak, vilja heldur ikki vita av Bush**

VITJAN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Hevði George W. Bush hugt í bretska blaðið The Independent, áðrenn hann kom til London í gjárkvøldið, hevði hann fingið at vita, at borgarstjórin í bretska høvuðsstaðnum er alt annað enn fegin um vitjan hansara, og at hann fór ikki at fáa nakra almenna móttøku frá býnum.

– Eg viðurkenni ikki George W. Bush, tí hann varð ikki lógliga valdur. Tí fara vit at skipa fyri einari aðrari móttøku fyri øllum øðrum enn honum, segði Ken Livingstone, borgarstjóri, við The Independent í gjár. Hann legði afturat, at Bush er tann størsta hóttanin ímóti lívinum á Jørðini, og at umsitingin hjá Bush er tann mest rasistiska stjórnarumsitingin, sum USA hevur havt tey seinastu 90 árini.

Sambært bretskum fjølmiðlum var Tony Blair, forsætisráðharri, í øðini um orðini hjá borgarstjóranum, og ein av talsmonnum Blairs kvikaði sær at gera vart við, at Ken Livingstone hevur loyvi at siga tað, sum hann hevur hug at siga. Ken Livingstone var limur í Labour, men varð koyrdur úr flokkinum, tá hann í 1998 gjørdi av at stilla upp til borgarstjóravalið í London sum óheft valevni.

### Ikki einsamallur

Meiningakanningar seinastu dagarnar benda tó á, at nógvir bretar eru samdir við Ken Livingstone. Í einari kanning, sum blaðið Sunday Times almannakunngjørdi sunnudagin, søgdu 60 prosent av teimum spurdu, at amerikanski forsetin er ein hóttan ímóti heimsfriðinum. Í somu kanningini svaraðu 37 prosent, at tey halda ikki amerikanska forsetan vera serliga vitugan.

At hann hevur nógvar mótstøðumenn í Bretlandi, fær Bush ivaleyst at síggja, tí fleiri felagsskapir hava boðað frá mótmælisgongum í London í dag og í morgin. Myndugleikarnir hava noktað mótmælisfólkunum at ganga fram við Parlamentinum ella Downing Street, men fyrireikararnir siga, at teir kortini ætla at geva Bush eina ábending um, at hann hevur ikki undirtøku í Bretlandi.

### Miseydnað

Amerikanska trygdartænastan Secret Service stúrir fyri mótmælisgongunum, og teir, sum skulu skipa fyri næsta forsetavalstríðnum hjá Bush eru heldur ikki fegnir um mómælini. Teir bera ótta fyri, at sjónvarpsmyndirnar frá mótmælistiltøkunum fara at forkoma teirri vanligu amerikonsku uppfatanini av, at bretar taka undir við amerikonsku tiltøkunum í Irak.

Harafturat kom tað amerikonsku fyrireikarunum illa við, at fleiri avvarðandi hjá bretskum hermonnum, sum eru falnir í Irak, hava sýtt fyri at at hitta amerikanska forsetan.



# M"as Blues Band við fløgu

**Um stutta tíð koma Emma og og hennara Blues Band út við nýggjari fløgu. Upptøkurnar byrjaðu síðst í Januar og fyri fjúrtan døgum síðani varð fløgan send til Danmark, har hon skal margfaldast**

FLØGUÚTGÁVA


*Emma og og hennara Blues Band koma í næstum út við nýggjari útgávu, og í hesum sambandi hevur nógv verið vitjað kring landið*

M"as Blues Band er eisini á einari Skúlakonsrtferð í hesum døgum,samtíðis gera tey eitt M"as Blues Band blað, ið verður bori út í hvørt heim í Føroyum fyrst í desember.

- Eg eri sera spent hvussu fólk fara at taka ímóti fløguni, sigur Emma Vágoy, ið fyri stórsta partin myndar bólkin úteftir. Vit høvdu eina samrøðu við Emmu í bussinum hjá M"as á veg til Kvívíkar, har tey skuldu spæla fyri barnagarðs og skúlabørnum.

- Eg eri spent til fløgan kemur út og eg vóni at fólk fara at dáma hesa fløguna, eins væl og tí fyrru. Tað var deiligt, at fólk søgdu við okkum, at teimum dámdu sangirnar, ið vóru á fløguni. Á hesari fløguni eru tólv sangir, á hinari vóru nýggju, so hendan er meira spennandi!

- Tað eru nógvir sangir, ið mær dámar væl at syngja. Gang gakk býtti Gutti, Digga Pól, Stress av Lakress. Sangin um Eyðstein. Mær dámar í veruleikanum allar sangirnar, men best dámar mær Babu tí tá syngja øll børnini við. Tey syngja harðari enn vit spæla, tað er stuttligt.

- Vit hava verið í fleiri skúlum og spælt fyri børnum, tað hevur verið sera stuttligt, eg gleði meg hvørjari ferð vit skulu út at spæla, tað er líka deiligt hvørja ferð. Eg verið ongantíð troytt av at syngja. Vit skriva eisini autografar til børnini á plakatir tey fáa frá okkum. Børnini eru glað og tey takað í hondina á okkum og takka fyri at vit duga so væl at spæla.

- Lennhard spælir trummur, Demmis Hansen guitar, Olfert Rasmussen Egg, Eyðstein spælir hund sigur Jóannes. Vit hava eisini fingið hjálp frá Finnur Hansen, Paula Magnussen, Regin Jacobsen og bussførarinum Árna Andreasen. Teir duga allir væl at spæla.

- Heitið á fløguni er Hetta er eisini mítt land II. Vit hava gjørt næstan allar sangirnar sjálvi. Steingrím Niclasen hevur gjørt orðini til ein teirra. Eisini hava vit eina sirpu, tað er nakrir av teim gomlu sangunum, ið vit hava blandað saman. Finnur Hansen hevur gjørt eitt remix av Babu sanginum. Hann eitur Baremixbu. Sangurin minnir um ein sang hjá Elvis, tað er tí at Eyðstein elskar Elvis og hann dugir at "sjeyka" sum hann.

- Vit gera nógv burturúr í ár, tí tað er ár teirra brekaðu og vit vilja við sangi og gleði gera vart við okkum. Vit fara til Klaksvík og Suðuroynna síðst í hesum mánaðinum og tað er nakað vit gleða okkum til. Vit hava ikki verið í Suðuroynni og spælt. Vit skuldi fara á Jóansøku men tá varð Lennart, Olfert og Demmis sjúkir, so nú verður tað.

So gekk leiðin inn í Kvívíkar skúla har børnini fingu Babu fyri allar pengarnar. Tað sigst, at hara er ikki sædd á Kvívíksleiðini síðani Emma og hennara Blues Band spældi fyri fult í Kvívík!

## Morgun

Morgun
Sólin hon skínur
Morgunin vaknar
Tað er ljós

Mykri
Myrkri tað svíkir
Dagurin bjarti
Vísir veg

Sólin hon rísur
Úr havinum upp
Dagurin vísir
Henni runt

Lívið
Lívið tað gongur
Lívið lærir
Teg og meg

Aldan
Aldan hon brýtur
Andar út
og liggur still

Eru vit sæl
Er lívið eitt spæl
Eru vit sæl
Er lívið eitt spæl

**Hans J. K. Mouritsen**




## Stórbart

Himmal og hav
vindur – logn
Kvirran ber boð um tøgn
sólin speglar sær
sum gimsteinar
tveittir út á hav
Roðin so skarlaksreyður
dregur teir niður við sær

Havið vaknar
hvítar perlur glitra
Vindurin
tað klára krystall
splintrast í túsund pettir
Vindur – logn
havið er vakurt

Myrkri kámar
tað fagra bleika lín
burtur tað er
Kalt í mánalýsi
tað snjóhvíta líni
andar í silvitni

Roðin sum eldur
fer runt
um tann sjónarring
har logn aftur er
sum skarlaksgull
við smaragdum og ven
er havið í logn

**Hans J. K. Mouritsen**

## VIÐMERKINGAR

# Skommin høvuðsstuðul undir galskapinum?

**Johan Petersen**

***Í kraft av manglandi undirtøku fyri fullveldispolitikki samgongunnar skammast tjóðveldisformaðurin ikki fyri, at nýta skomm veljaranna sum høvuðsargument fyri framhaldandi galskapspolitikki.***

Í Degi og Viku í seinastu viku var sum vanligt viðtal við tjóðveldisformannin Høgna Hoydal, sum gjørdi viðmerkingar til nýliga almannakunngjørdu veljarakanninga.

### Tað sum skilir okkum í dag, savnar okkum í morgin!

Ein av (sum vanligt positivt leiðandi) spurningunum var, hvørja viðmerking hann hevði til manglandi undirtøkuna fyri yvirtøku av løgreglu og rættarskipan. Men snúðin sum tjóðveldisformaðurin er, vendi hann øllum á høvdið (og sjálvandi lat svf-journalisturin hann sleppa við tí) og vísti á, at tá ið yvirtøkurnar vóru framdar, vóru tað bert sera fáir veljarar, sum ynsktu t.d. blokkstuðulin hækkaðan aftur. "Tað sum skilir okkum í dag, savnar okkum í morgin" segði tjóðveldisformaðurin ganska frekt.

### Veljarin skammast

Men her tekur hann so grúvuliga feil og tað veit hann eisini. Orsøkin til at



sera fáir veljarar vilja hava blokkin at hækka aftur er ikki, tí teir taka undir við galskapspolitikki samgongunnar, men av tí, at teir skammast at fara aftur til Danmarkar at biðja danir yvirtaka yvirtikin mál aftur.

### Samgongan skammleys

Samgongan er skammleys, men tað er føroyski veljarin ikki. Hann er ærukærur og ynskir ikki eyðmýking frá øðrum londum av skammiliga galskapspolitikki samgongunnar, nei so heldur bíta skommina í seg.